**Fylgiskjal 1**

# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 21. februar 2019
Mál nr.: 19/00092
Málsviðgjørt: HKV

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| **§ 3 a.** Felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera íløgur fyri meira enn kr. 1 mió., meir-virðisgjald ikki íroknað, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjald av samlaða íløgukostnaðinum.<br>*Stk. 2.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið sambært stk. 1, skal:<br>1) talan verða um ikki vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi, har í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, meirvirðisgjald ikki íroknað, er fingin til vega sum gáva ella við óløntum og sjálvbodnum arbeiði,<br>2) arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, verða byrjað eftir 1. januar 2013 og endað í seinasta lagi 5 ár eftir, at umsókn er góðkend, og<br>3) umsókn um endurgjald fyri inngangandi meirvirðisgjald vera móttikin av TAKS í seinasta lagi **<u>31. desember 2019.</u>**<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri treytir og reglur um at fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjald sambært stk. 1. | **§ 3 a.** Felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera íløgur fyri meira enn kr. 1 mió., meir-virðisgjald ikki íroknað, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjald av samlaða íløgukostnaðinum.<br>*Stk. 2.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið sambært stk. 1, skal:<br>1) talan verða um ikki vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi, har í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, meirvirðisgjald ikki íroknað, er fingin til vega sum gáva ella við óløntum og sjálvbodnum arbeiði,<br>2) arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, verða byrjað eftir 1. januar 2013 og endað í seinasta lagi 5 ár eftir, at umsókn er góðkend, og<br>3) umsókn um endurgjald fyri inngangandi meirvirðisgjald vera móttikin av TAKS í seinasta lagi **<u>31. desember 2024.</u>**<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri treytir og reglur um at fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjald sambært stk. 1. |